# Neistin aftur úti í Europa

**Tað var tann tíð, tá føroysku hondbóltsfeløgini vóru ófør at senda lið síni út til tær europeisku kappingarnar, men seinnu árini hevur verið heldur soltið við tí. Men nú bjóða menninir hjá Neistanum – sum ráðandi føroyameistarar – aftur Europa av.**



*Heðin Mortensen*

Ikki kann sigast annað, enn at tað er stak hugaligt, at hondbóltsfelagið Neistin aftur ger eina roynd at seta Føroyar og Havnina á hondbóltsliga europakortið, nú menninir hjá Neistanum, sum í vár gjørdust føroyameistarar, í EHFC-kappingini spæla ímóti felagnum HC Lovcen, sum er úr »hondbóltshøvuðsstaðnum« Cetinje í Montenegro.

Í mun til Neistan er HC Lovcen eitt felag, sum regluliga hevur verið við í europeisku kappingunum seinnu árini, og besta úrslitið var kappingarárið 2000/2001, tá HC Lovcen gjørdist nummar fimm í Champions League-kappingini, og árini síðani hevur HC Lovcen verið skiftivís við í Champions League-, EHF Cup- and City Cup-kappingunum.

Heimahoyrandi í Montenegro, hevur HC Lovcen fyrr verið við í kappingini í gamla Jugoslavia, og árið fyri besta Champions League-úrslitið var felagið jugoslaviskur meistari. Sum skilst á lagnum, hevur HC Lovcen verið meistari í Montenegro síðstu tvey kappingarárini, so hetta má metast sum eitt sterkt mótstøðulið, Neistin hevur fingið.

Av tí sama var tað kanska ikki óvæntað, at Neistin tapti fyrra dystin ímóti HC Lovcen niðri í Montenegro, men nú er ein annar og nýggjur dystur, so tað er við opnum sinni, at farið verður á vøllin í heimadystinum. Kann vera, at HC Lovcen hevur tiltiknar heimaáskoðarar, men stuðulin til Neistan í seinna dystinum man ikki fara at tróta!

## Stuðla hvønnannan

Hetta er ikki løtan, tá gitast skal um úrslit, tí tað má dysturin bara vísa. Men vit vita av royndum, at fyrireikingarnar hjá Neistanum plaga at vera fyrimyndarligar, tá stórar uppgávur standa fyri framman og tøk skulu takast. Alt er væl skipað og í góðum hondum, og eingin ivi er um, at menninir hjá Neistanum fara at gera sítt besta.

Sum nevnt, hevur verið smáligt við føroyskum feløgum í europeisku kappingunum seinnu árini, men tó hava kvinnurnar hjá Stjørnuni verið eitt undantak. Júst tí er tað eisini hugaligt, at Havnin tekur dystin upp við Klaksvíkina og sendir sínar bestu hondbóltsmenn til EHFC-kappingina, tí okkum nýtist ikki at smæðast burtur.

Tá tað snýr seg um slíkar dystir, hevur tað heldur ikki so nógv at siga, hvaðani liðini eru, sum velja at umboða føroyskan hondbólt í Europa, tí tá bakka vit øll upp. Slík átøk eru sameinandi og í besta ítróttaranda, og feløgini eru í slíkum førum sum landslið, so vit taka sjálvsagt lógvatak og stuðla hvørjumøðrum.

Samstundis sum eg ynski Neistanum alt tað besta í dystinum leygardagin, vil eg eisini ynskja kvinnunum hjá Stjørnuni góða eydnu í sínum báðum dystum ímóti HK Slovan Duslo Šaca úr Slovakia. Teir báðir dystirnir, sum eisini eru um vikuskiftið, verða báðir spældir í Klaksvík, so vit fara eisini spent at fylgja við teimum.

Hava arbeitt miðvíst

Eitt annað, sum er stak hugaligt í sambandi við avbjóðingina, Neistin nú hevur tikið á seg og er farið undir við góðum treysti, er miðvísa ungdómsarbeiðið, sum í mong ár hevur verið fyrimyndarliga væl gjørt í felagnum. Børnini og tey ungu fáa nakað at síggja fram og upp til, tá vaksnamannaliðini vilja royna seg.

Bestu kvinnu- og mansliðini eru aloftast at rokna sum flaggskip hjá feløgunum, og soleiðis man tað eisini vera hjá Neistanum. Men flaggskipini kunnu ikki avrika nógv, uttan at forarbeiðið hevur verið í lagi í fleiri ár frammanundan, tí øll framgongd hjá teimum vaksnu má vera avøkstur av tí, spælararnir hava fingið í beinið á yngri árum.

Hetta er vorðið sum byrjan upp á eitt nýtt kappingarár, tí eingin man ivast í, at eisini í hesum seinna dystinum ímóti HC Lovćen verður neyðugt hjá Neistamonnum at spíla seg út, sum á pappírinum má sigast at vera stórfavorittur. Men hví skuldi »Dávid ímóti Goliat« ikki endurtikið seg – eisini í europeiskum manshondbólti?

Sum borgarstjóri fyri høvuðsstaðin eri eg errin av, at Neistin hevur tikið hesa avbjóðing á seg, og mítt ynski skal vera, at úrslitið verður so gott sum gjørligt. Vit verða mong, sum fara at taka á við Neistanum, tá dysturin verður bríkslaður í gongd, tí slíkt áræði til at bjóða Europa av, hevur allan góðan stuðul uppibornan!

**Heðin Mortensen**
**borgarstjóri**


**Útgevari:** Neistin
**Uppseting:** Sosialurin
**Prent:** Prentmiðstøðin
**Lýsingar:** Neistin



Havnin – altíð ein serlig uppliving



Tórshavnar kommuna

www.torshavn.fo


Sosialurin